Januar 2011

# einfaldari

*- ger tað einfaldari*

## Tómt á Brekku




*Rúni Højgaard og Jógvan Zachariassen flyta. CIA (Christians in action) stendur á keppinum hjá Rúna*

Leygardagin 5. desember varð alt innbúgvið, sum Lívdin átti í hølunum á Brekku, flutt í húsini, sum samkoman hevur keypt á adressuni oman Hoydalar 28.

Meginparturin av virkseminum hjá samkomuni hevur í fleiri ár gingið fyri seg í hølunum hjá Bygma Balslev á Brekku í Hoyvík, so sum bønarmøtir, ungdómsmøtir og tónleikavenjing. Eftir ætlan verða hesi tiltøk nú í húsunum oman Hoydalar.

* Fleiri myndir frá flytingini inni í blaðnum.

## At gloyma og at minnast

Nýggjárið hevur júst verið, tá flestu okkara hyggja aftur á tíðina, sum farin er, eins og vit seta okkum mál fyri tíðina, sum kemur.

Í Fil. 3,14 skrivar Paulus ápostul: *"Eg gloymi tað, sum aftanfyri er, rætti meg eftir tí, sum frammanfyri er, og stevni móti málinum".*

Gloymdi Paulus veruliga alt tað, sum farið var? Eg haldi ikki, at tað er júst tað, sum hann skrivar, tí Paulus skrivaði eisini mangan um týdningin av at minnast. Spurningurin er tí, um vit ikki eiga bæði at gloyma og at minnast samstundis.

Tá vit sum einstaklingar hyggja aftur á lívið, so hava vit øll havt signingarrík tíðarskeið við sigrum eins og tungar royndartíðir við ósigrum, og báðum hesum kunnu vit læra av. Samstundis mugu vit ansa eftir, at hesar erfaringar ikki fara at avmarka okkara lív saman við Gudi framyvir.



Latið okkum tí hyggja aftur á farnar dagar og minnast, so vit kunnu gleðast um teir sigrar, vit hava havt í lívinum, og læra av ósigrunum. Men lat okkum eisini "gloyma" hesi tíðarskeið, soleiðis at vit ikki avmarka Gud til at gera alt júst á sama hátt, sum Hann gjørdi í farnum tíðum, og vit ikki liva í fordøming um tey mistøk, vit gjørdu.

Og tá vit so hyggja frameftir, lat okkum – undir Guds leiðslu – seta okkum sera høg mál at stevna fram ímóti. So høg mál, at vit als ikki kunnu náa tey … um ikki Gud er við okkum!!!

*Absalon Áargarð*

# Hendingar & tiltøk

## Samkomuveitsla



Árliga samkomuveitslan hjá Lívdini verður leygarkvøldið 29. januar kl. 19.00 í Oasuni.

Fyrireikararnir vóna, at hetta verður eitt kvøld, har øll fara at hugna sær, og ynskja, at bæði eldri og yngri koma við til veitsluna. Aldursmarkið er 17 ár.

Kostnaðurin er 225 kr pr. persón. Buffé verður keypt úti frá. Peningurin skal flytast á kontu í Eik – konto nr. 9181 - 1665970 (Lív Clementsen stendur fyri kontuni). Flytingin er samtíðis tilmeldingin til veitsluna. Seinasta freist at melda til er 23. januar.

## Til lukku við barninum

20. septembur 2010 fingu Mariann & Bardo Rios, Keypmannahavn, tvíburar. Alex var 53 cm langur og vigaði 3295 gr. Heidi var 52 cm long og vigaði 3080 gr.

12. desember 2010 fingu Alisa Hammer og Ási Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon vigaði 3.350 gr og var 52 cm long.

## Til lukku við hjúnabandinum

Leygardagin 18. desember 2010 giftust Lillian Sjúrðardóttir og Torkil Jonsson í Hoyvíkar Kirkju.



## Samkomulega

Vikuskiftið 11.-13. mars verður samkomulegan hjá Lívdini á Zarepta. Nærri verður lýst um tilmelding o.a. seinni.




## Skeið í trúarverju

Frá 21. til 25. februar verður skeið í trúarverju á Zarepta, har til ber at fáa spurningar svaraðar sum t.d. Er Gud til? Er Jesu uppreisn søgulig? Hví loyvir Gud líðing? Lær um vísund, skapanina, menning, kjakhættir o.s.fr. Aldursmarkið er 17 ár, og skeiðið kostar kr. 950 fyri einstaklingar og kr. 1700 fyri pør. Tilmelding fer fram á www.om.fo

Seinasta freist at melda seg til er 10. februar.

Les meira á heimasíðuni www.om.fo

## Umvælingararbeiði á Zarepta

Ætlanin er gera ymiskt umvælingararbeiði á Zarepta í hesum mánaðinum. Talan er um handverk sum t.d. timbur-, el-, rør-, múrara- og málaraarbeiði og annars vanligt viðlíkahald.

Ætlanin er at brúka øll vikuskiftini í januar umframt aðrar dagar, tá tað liggur fyri.

Áhugað eru vælkomin at seta seg í samband við Pola Vang (tlf. 214992), Heina Heinesen (tlf. 215213) ella Jógvan Østerø (tlf. 597713).

## Samtalur

Fólk frá Glóðini siga frá, at fólk altíð eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við. Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011.

## Í menniskjum góður tokki

Í desember tók Lívdin, saman við mongum øðrum stuðlum, lut í tiltakinum "Í menniskjum góður tokki". UngLív, HyperLife og sunnudagsskúlin savnaðu pening inn til tiltakið, sum hevði til endamáls at rætta barnafamiljum, sum eru illa fyri fíggjarliga, eina hjálpandi hond á jólum.

## Myndir frá flytingini

Myndir, sum Rúni Højgaard tók, tá innbúgvið hjá Lívdini á Brekku varð flutt til oman Hoydalar 28.



*Lív Clementsen*

*Erling Bech við trummunum*





*Absalon Áargarð*

*Oman Hoydalar 28*



## Gávuhugskot

Hvat við at stuðla einum tannáringini í at koma á kristna altjóða legu í Týsklandi í summar?
Í fjør vóru yvir 300 føroyingar á TeenStreet :-)

Tað er møguligt at keypa gávukort á www.teenstreet.fo - Við einum gávukorti í hondini, verður tað lagaligari at koma á TeenStreet í summar.

*Durita*




## Djurholm í TeenStreet leiðsluni

Durita og Pauli Djurholm eru komin í leiðsluna í TeenStreet Føroyum.
Heimasíðan hjá TeenStreet skrivar, at arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og tungar. Tí er tað gleðiligt, at vit kunnu vera enn fleiri, sum bera hesar uppgávur. Durita og Pauli hava verið á TeenStreet tey seinastu tvey árini og hava hjarta fyri ungdóminum og fyri TeenStreet.



Umframt Duritu og Paula eru eisini Ruth Gaardlykke og hjúnini Anita og Oddmar Tausen við í TeenStreet leiðsluni.

## Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt




### Sunnudagin 2. januar

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Familjuinnslag: Nýggj byrjan* |
| | *Talari: Beinta Áargarð* |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | *Evni: Við Gudi...ella uttan* |
| | *Talari: Absalon Áargarð* |

### Sunnudagin 9. januar

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Familjuinnslag: Ymiskleiki/einleiki* |
| | *við Barbaru Jakobsen* |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | *Evni: Livið í einleika* |
| | *Talari: Preben Hansen* |

### Sunnudagin 16. januar

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Evni: Hvussu Lívdin byrjaði* |
| | *Talari: Jens Wang* |
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Evni: Vón. Talari: Jóhan Syderbø.* |
| | ** Sjónvarpsmøti* |

### Sunnudagin 23. januar

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Familjuløta:* |
| | *Heilsan frá familjuni Guttesen* |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | *Evni: Vón. Talari: Erna Háberg.* |

### Sunnudagin 30. januar

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | *Familjuløta: Familjuinnslag um vón* |
| | *Talari: Dánjal Petersen* |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | *Evni: Vón. Talari: Gunnar Nielsen.* |

## Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*